# Bátafelagshús og undirhús í Kollafirði

**FELAGSLÍV** Í Kollafirði er bátafelag, og hvønn leygarmorgun hittast yngri og eldri sjómenn til prát, kaffi og morgunmat

Vilmund Jacobsen

Kollafjarðar Bátafelag hevur eftirhondini nøkur ár á baki, og felagið hevur eisini felagshús við bátahylin. Húsini virka sum eitt undirhús, har menn kunnu savnast og tosa um ymiskt, sum er uppi í tíðini.

Hvønn leygarmorgun hittast yngri og eldri sjómenn soleiðis til prát, kaffi og morgunmat.

Kollafjarðar Bátafelag er sum so ikki ein positiv avleiðing av, at fólk eru farin at sigla meiri og hugna sær í báti saman.

Limirnir í felagnum og teir, sum annars hittast í felagshølunum við bátahylin, eru í flestu førum uppilagstir sjómenn, sum hava hug at hittast til prát.

Úr Kollafirði frættist, at einir 40-50 limir eru í Kollafjarðar Bátafelag, og fleiri teirra eru raskir at vitja felagshølini leygarmorgnar.

– Vit hava eitt skifti, har onkur syrgir fyri kaffi og morgunmati hvønn leygarmorgun, og síðan hittast vit til prát og eina hugnaliga løtu saman.

Kollafjarðar Bátafelag hevur eina bússu, har menn kunnu koyra nøkur oyru í, og soleiðis dekka hesar krónurnar tað, sum kaffi og morgunmatur kosta.

– Í flestu førum eru tað somu menn, sum leygarmorgnar savnast í hølunum, men onkuntíð detta aðrir inn á gólvið, sum kanska búgva aðrastaðni, men hava eitt tilknýti til bygdina, verður sagt úr Kollafirði.



*Hølini hjá Kollafjarðar Bátafelag liggja við bátahylin í Kollafirði, beint vestanfyri húsini hjá Kollafjarðar Bjargingarfelag*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*








Sosialurin 341800

Vit hava
ruskbyngjur
...til ein og hvønn tørv

SITCON
Inni í firði 107 • Kollafjørður • tel. 588886

Sosialurin 341800

Vit eru í nýggjum hølum
í Sundum 51
Okkara nýggja telefonnr. er:
727272

ID-EL
tel. 727272 • id-el@post.olivant.fo

um...
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
...er lisin
-so ert tú við!